# Grannar kappaðust um somu hús

**- Hetta er samstarv á høgum støði, sigur sigur Heðin Zachariasen turrisliga**

SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta er samstarv á høgum støði!

Heðin Zachariasen er heldur spoyskur, tá ið hann skal siga sína meining um seinasta úrslitið av sokallaðum samstarvi ímillum grannakommunurnar báðar, Sunda Kommunu og Eiðis Kommunu.

Tað, sum hann sipar til, er, at Eiðis Kommuna hevur brádliga keypt gomlu tannlæknastovuna í Hvalvík – sum altso er í Sunda Kommunu.

– Vit høvdu annars samstarv um tannlæknan og vit hildu, at vit meiningin var, at vit eisini framyvir skuldu samstarva húsini.

Men samstundis hava vit, hvør í sínum lagi bjóðað ímóti hvørjum øðrum um at fáa fatur á húsunum, sum tannlæknastovan er í.

– Hetta er sum tvey, ið ætla at giftast, men kortini kappast ímóti hvørjum øðrum um at bjóða upp á húsini, tey skulu búgva í, er ein viðmerking úr Sunda kommunu.

Heðin Zachariasen sigur, at forsøgan er hendan:



*Gongur heilt galið, kann henda, at Sunda Kommuna fær sær sín egna tannlækna í gomlu kommunuskrivstovinu, sum eisini er í Hvalvík, einar 100 metrar frá tannlæknastovuni hjá eiðisfólki*

Eiði og Sunda Kommuna hava samstarva um tannlæknan, sum er í hølum í Hvalvík.

Men tá ið tannlæknin doyði vendu vit okkum til búgvið um møguleikan at leiga klinikkina til hon varð seld, men tað bar ikki til.

– Síðani bjóðaðu vit Eiðis kommunu til fundar at viðgera møguleikan fyri at keypa tannlæknavirkið í Hvalvík og at halda fram við samstarvinum.

- Vit skuldu hoyra aftur frá Eiðis Kommunu, men vit frættu ongantíð aftur.

Heðin Zachariasen sigur, at tískil kom Sunda Kommuna til ta niðurstøðu at royna at keypa húsið og tí løgdu vit boð inn, sum vit hildu vera hóskandi.

- Men sum tíðin gekk og tí sleptu vit hálvavegna ætlanini um at keypa. Og í farnu viku tóku vit málið upp til viðgerðar um at keypa útgerð til eina klinikk og at gera eina nýggja klinikk í gamla kommunuskrivstovuni í Hvalvík.

Ímeðan fingu vit eisini upplýst, at Eiðis Kommuna var áhuga at keypa útgerðina.

– Tí tóku vit málið uppaftur og samtyktu at bjóða 1,8 millión fyri húsið og útgerðina.

Men í farnu viku kom undan kavi, at Eiðis Kommuna hevur bjóðað 1. 950.000 krónur fyri hús og útgerð.

- Í Sunda Kommunu eru vit samd um, at tað er ikki rætt at kappbjóða við Eiði um húsið og útgerðina og sostatt draga vit í land aftur.

Sostatt sær út til, at Eiðis Kommuna keypir tannlækna klinikk í Sunda Kommunu.

Her skal eisini viðmerkjast, at í løgtingislógini um kommunusamanlegging, er ásett, at skal Eiði leggja saman, skal tað vera við Sunda Kommunu.

### Undarlig støða

Borgarstjórin í Sunda Kommunu heldur, at hetta er ein undarlig støða at koma í.

– Vit vildu ikki keypa klinikkina fyrrenn vit høvdu spurt Eiðis Kommunu fyri at vita um vit ikki skuldu samstarva um keypið.

– Vit hoyrdu onki aftur, men Eiðis Kommuna skal vera vælkomin at gera íløgur í Sunda Kommunu.

Hann sigur, at nú fer at seta seg í sambandi við Eiðis Kommunu at vita, um Sunda Kommuna kann keypa sínar tannlæknatænastur frá Eiðis Kommunu.

- Eydnast ikki at semjast um ein prís, keypa vit okkara egnu útgerð og gera eina tannlæknaklinikk í gomlu kommunuskrivstovuni - einar 100 metrar frá har, tannlæknaklinikkin er.

– Sostatt fáa vit tveir tannlæknar í Sunda Kommunu og teir eru báðir í Hvalvík. Men tað eru grannakommunurnar, sum eiga hvør sína, leggur hann afturat.

# Frættu onki og søgdu onki

**- Vit skuldu hoyrast aftur, men tað hendi ongantíð. Men so frættu vit, at Sunda Kommuna var ikki áhugað og sostatt fóru vit sjálvi til verka, sigur Tordur Niclasen úr Bygdaráðnum á Eiði**

SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit hava fyrst og fremst gjørt hetta fyri at fólkinum á Eiði eina góða tænastu.

Tordur Niclasen er formaður í mentanarnevndini í bygdaráðnum á Eiði og hann heldur ikki, at tað er løgið, at Eiðis Kommuna hevur keypt tannlæknastovuna í Hvalvík.

– Vit høvdu ein fund um at Sunda- og Eiðis kommuna skuldu keypa tannlæknastovuna í felag. Ongin avgerð varð tikin, men vit skiltust upp tað, at vit skuldu hoyrast aftur.

Men Tordur Niclasen sigur, at á Eiði hoyrdu tey onki aftur frá Sunda Kommunu.

- Tað næsta vit frætta er, at vit síggja á heimasíðuni hjá Sunda Kommunu og lesa í bløðunum, at tey eru ikki longur eru áhugað at keypa tannlæknastovuna

Tí helt bygdaráðið á Eiði, at so var hendan søgan úti.

Síðani frættu vit, at Sunda Kommuna ætlaði at gera sína egnu tannlæknastovu í gomlu kommunuskrivstovuni.

Bygdaráðið á Eiði fór eisini at arbeiða fyri at fáa sín egna tannlækna.

– Tað næsta, sum hendi, var at búgvið eftir tannlæknan spurdi seg fyri hjá Eiðis Kommununu, um vit vóru áhugað í at keypa útgerðina úr húsinum.

Tordur Niclasen sigur, at tað var bygdaráðið á Eiði áhugað í við støði í, at Sunda Kommuna hevði slept ætlanina.

- Tá ið hetta næstan var komið undir land, frættu vit, at Sunda Kommuna hevði skift støðu og hevði bjóðað upp á húsið og útgerðina.

Tordur Niclasen sigur, at sostatt bar ikki til hjá Eiðis Kommunu at fáa útgerðina einsamalla og tí gjørdi bygdaráðið av at yvirbjóða Sunda Kommunu.

### Bjóða til samstarv

Tordur Niclasen sigur, at Eiðis Kommuna hevur fyrst og fremst gjørt hetta fyri at kunna tryggja eiðisfólki eina góða tænastu á økinum.

Tordur Niclasen sigur, at keypir Eiðis Kommuna húsini og útgerðina, eru ognarviðurskiftini greið.

Men tað fer á ongan hátt at forða fyri einum samstarvi á økinum ímillum báðar kommunurnar.

– Vit fara nú at bjóða Sunda Kommunu í eitt samstarv, har tey kunnu keypa tænastur á økinum frá okkum, sigur formaðurin í mentanarnevndini á Eiði.

Tað ljóðar sum um at tit hava tikið støðu út frá tí, sum tit hava sæð í bløðunum og á heimasíðuni hjá Sunda Kommunu. Settu tit tykkum ikki beinleiðis í samband við Kommuna, áðrenn tit bjóðaðu upp á húsið

– Tað var púra alment, at Sunda Kommuna ætlaði at fáa sín egna tannlækna, tí tað stóð í bløðunum og á heimasíðuni hjá kommununi. Tí var ongin orsøk hjá okkum at seta okkum í samband við Sunda kommunu, tí teirra støða var greið.

– Samstundis hoyrdu vit heldur ikki frætt fra Sunda Kommunu og tí tóku vit okkara støðu, sigur Tordur Niclasen.

Hevði tað ikki verið bíligari hjá báðum kommununum at havt tannlæknastovuna í felag?

– Tað er møguligt, men vit ætlaðu at fáa eina bíliga loysn við at keypa útgerðina. Men tað gekk ikki, tí Sunda Kommuna bjóðaðu upp á alla ognina. Tí bjóðaðu vit ímóti og hava fingið eina frálíka tænastu til okkara borgarar

Tordur Niclasen leggur afturat, at ongin ivi er um, at hetta er bara ein fyribils loysn, tí hann væntar avgjørt, at einaferð í framtíðini verður tannlæknastova helst gjørd á Eiði.



*Hetta er tannlæknastovan, sum hevur fingið tey í Sunda Kommunu og í Eiðis Kommunu í eina løgna støðu. Hetta er sum tvey ið ætla at giftast, men kortini kappast ímóti hvørjum øðrum um at bjóða upp á húsini, tey skulu búgva í, er ein viðmerking úr Sunda kommunu*